# Snýttu deyðsfellu í Vágunum

**Eitt ferðsluóhapp var á Vatnavegnum í Vágum leygarnáttina. Staðið hevur gjøgnum árini kravt mong mannalív, og tað verður skírt eitt satt undur, at ongin av teimum sjey ungu í bilinum læt lív**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Løgreglan í Vágunum fekk fráboðanina um eitt tíðina leygarnáttina. Bilurin, sum var á veg til Vatnsoyrar fór av vegnum við Gjógvin við Lýð. Tað er eitt sera vandamikið stað, sum hevur kravt fleiri mannalív seinnu árini. Og eftir bilinum at døma má tað sigast at vera eitt satt undur, at øll komu frá óhappinum við lívinum.

Sjey fólk vóru í bilinum, og sostatt kann út frá tí staðfestast, at ikki øll sótu í trygdarbelti. Løgreglan í Vágunum veit ikki, um nakar sat í trygdarbelti, tí enn hevur hon ikki avhoyrt fólkini í bilinum.

Hvør orsøkin til óhappið er, er sostatt heldur ikki staðfest enn. Vakthavandi er varin við at úttala seg um tað.

– Eg var ikki á vakt, tá fráboðanin kom, men tað eru nøkur viðurskifti, sum kundu týtt uppá, at nakað av ferð hevur verið, men tað er ikki staðfest, sigur vakthavandi.

Hann greiðir frá, at bilurin fór niðan av vegnum í eina grøv, har hann koyrdi einar 70 metrar, áðrenn hann umvegis ein betongklossa steðgaði. Klossin varð fluttur av bilinum, og vakthavandi heldur, at alt hetta kundi týtt uppá, at ov nógv ferð hevur verið á bilinum.

Tey ungu fólkini í bilinum, vórðu alt fyri eitt flutt á Landssjúkrahúsið. Ongin hevði fingið álvarsligan skaða. Men tann eini lá framvegis inni til eftirlit sunnudagin. Hesin hevði fingið skaða í høvdið. Onkur annar hevði fingið skaða í beinini, men sum sagt er ongin av teimum í lívsvanda, og bert tann eini varð liggjandi á sjúkrahúsinum.




*– Tað er eitt satt undur, at ongin lat lív í hesum óhappinum, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Miðvági*

*Mynd: Sonni Jacobsen*

**Deyðsfella**

Vegastrekkið á Vatnavegnum, har sum óhappið hendi, er ein sonn deyðsfella.

– Tað er eitt undur, at ongin lat lív í hesum óhappinum. Eftir bilinum at døma áttu fleiri at hava verið deyð, so hættisligt sá tað út, sigur vakthavandi.

Hesin vegurin verður sagdur at vera skrekkurin í oynni. Vakthavandi sigur, at tá fráboðanir koma um ferðsluóhapp á hesum vegnum, tá verður altíð hugsa, hvør man vera farin nú.

– Tað er kanska ljótt at siga so, men tað er ein sannroynd, at hetta vegastrekkið hevur kravt mong mannalív seinnu árini, tí tað er so vandamikið.

Vakthavandi heldur, at okkurt kundið verðið gjørt fyri at fyribyrgt vanlukkum á hesum vegnum. Hann heldur, at Ráðið fyri Ferðslutrygd kanska kundi heitt á Landsverkfrøðingin um at gera autoverju niðan av vegnum eisini.

– Tað er ikki vanligt, at autoverja er niðanav, men tað kundi bjargað mannalívum í hesum førinum, heldur vakthavandi.

Hann heldur fram, at fram við vegnum eru hamrar og áir, og hesi gera, at tað er sera vandamikið, um ein bilur fer av vegnum.

– Tað er satt at siga meiri vandamikið, um ein bilur fer niðan av vegnum enn omanav, sigur vakthavandi, sum ásannar, at upplýsingararbeiði er gott, men heldur kortini, at autoverja framvið vegnum báðumegin hevði kunnað fyribyrgt fleiri hættisligum óhappum á Vatnavegnum.

– Fleiri hava latið lív á sama staði á hesum vegastrekkinum, so hetta er ein sonn deyðsfella, sigur vakthavandi.

Kanningar verða nú gjørdar av óhappinum, og øll sjey í bilinum verða avhoyrd. Umframt at blóðroynd er tikin av teimum øllum. Vakthavandi sigur, at tað kann vera, at rúsdrekka var uppií, og løgreglan gjørdi av at taka blóðroynd av øllum av løgfrøðisligum orsøkum.

– Hevur tú ein sang liggjandi í skuffuni, sum bert samlar støv, og sum eingin enn hevur hoyrt, men sum tú heldur er nokk so góður?

Singer/songwriter 2003 er ein kapping fyri føroyskar tónleikarar. Endamálið er at geva einstaklingum, ið megna bæði at skriva og framføra egnan tónleik, ein føroyskan pall.

Luttakarin skal framføra tvey nýggj føroysk løg.

Undanumfør verða annað hvørt leygarkvøld, til allir tilmeldaðir sangskrivarar hava framført. Tríggir luttakarar verða við í hvørjum umfari, har ein vinnari verður kosin. Føroya besti singer/songwriter verður síðani funnin í einari finalu.

Finaluvinnarin sleppur í upptøkuhøli hjá Útvarpi Føroya. Hotel Hafnia letur eisini eina virðisløn. Aftaná kappingina spæla luttakararnir fleiri løg, um teir hava hug.

Fyrsta undanumfar verður í Hafnia Lounge á Áarvegnum, leygarkvøldið 11. oktober kl. 21:00

SINGER/ SONGWRITER 2003

Tilmelding: Hotel Hafnia; att.: Michael Jensen; tel: 313233

REPROZ

# Aliringur sleit

**Í nógva vindinum á Kaldbaksfirði sunnudagin sleyt ein aliringur hjá Pf Gulin í Havn, og somuleiðis sleyt ein fóðursilo seg leysa**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Um middagsleitið sunnudagin fekk løgreglan í Havn fráboðan um, at ein aliringur lá og rak fyri veður og vind á Kaldbaksfirði. Hesin hevði slitið seg leysan í nógva vindinum. MRCC støðin boðaði eigaranum Pf Gulin í Havn frá, og tey fingu leigað ein pressara frá Tórshavnar Skipasmiðju og sleipað ringin uppá pláss aftur.

Seinnapartin kom enn ein fráboðan orsakað av vindi. Hesuferð var tað ein fóðursilo, sum verður nýtt í sambandi við aling, sum hevði slitið seg leysa. Hendan stendur beint út fyri Sundsverkinum.

**Koyrdi ov skjótt**

Sunnunáttina um eitt tíðina steðgaði løgreglan einum bili, sum koyrdi ov skjótt. Ferðin varð máld til 136 km/t, so bilførarin kann vænta sær ein treytaðan dóm og skal eisini upp til nýggja koyriroynd.

Leygarnáttina tók løgreglan ein bilførara á Marknagilsvegnum í Havn, sum var ávirkaður av rúsdrekka. Bilførarin blásti 1,36 ‰ og verður skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.



# Weekendavísin umhugsar endurgjald frá Lassa Klein

**Hans Mortensen, tíðindamaður á danska blaðnum Weekendavisen, umhugsar nú hvørt hann skal krevja endurgjald frá Lassa Klein fyri stuldur av framleiddum tilfari ella ikki. - Hetta er rættiliga grovur atburður av føroyska politikaranum, sigur Hans Mortensen**

UPPHAVSRÆTTUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

- Eg havi ongantíð fyrr upplivað, at framleitt tilfar hjá mær uttan víðari er tikið og nýtt orðarætt í øðrum samanhangi, uttan at nøkur kelda er uppgivin, og í mínum eygum er hetta sera frekur atburður!

Soleiðis sigur Hans Mortensen, journalistur á Weekendavísini, sum mátti síggja grein sína verða nýtta í føroyskum lesarabrævi frá formanninum í Landsfelagi Sjálvstýrisfloksins, Lassa Klein, har føroyingurin umsetti upprunaligu greinina um bretskan og danskan politik til føroysk viðurskifti, har bert nøvnini á politisku flokkunum vórðu skift út, uttan at nøkur kelda varð upplýst.

Sjálvur hevur Lasse Klein á erligan hátt ásannað, at kelda hansara skuldi verið upplýst, hóast hann ikki metir seg hava framt lógarbrot men heldur fingið íblástur úr Weekendavísini.



*Hans Mortensen, blaðmaður á donsku Weekendavísini, umhugsar nú saman við danska Blaðmannafelagnum, hvørjar avleiðingarnar skulu gerast fyri Lasse Klein at hava umsett grein sína uttan at upplýsa kelduna*

**Endurgjald**

Hans Mortensen, upprunaligi høvundurin til samrøðu við Bernhard Ingham, fjølmiðlaleiðara í Thatcherstjórnini, heldur talan vera um grovan og frekan atburð at nýta tíðarkrevjandi og framleitt tilfar frá øðrum tíðindamanni uttan at spyrja seg fyri og søkja um loyvi.

- Hetta havi eg satt at siga ikki upplivað fyrr, og eg kann ikki siga, hvørjar ítøkiligar avleiðingarnar verða av hesum, við tað at málið er so nýtt fyri mær, vísir Hans Mortensen á.

Hann leggur afturat, at hann júst er upplýstur um málið frá danska Blaðmannafelagnum, men enn nýtist honum at hyggja nærri at lesarabrævinum frá Lassa Klein og seta seg í samband við fakfelagið hjá donsku blaðmonnunum at ráðføra seg saman við teimum.

- Tað er greitt, at hetta er álvarsamt, og tískil má eg tosa við Blaðmannafelagið og umhugsa, um endurgjald skal krevjast frá viðkomandi politikara, undirstrikar tíðindamaðurin á Weekendavísini.

*Tað var henda greinin á forsíðuni á Weekendavísini, sum skapti rumbul kring Lassa Klein*




**Eisini skeivt móti kelduni**

Hans Mortensen vísir á, at sitering av aðrari grein við upplýsing um keldu als ikki er brot á journalistiska upphavsrættin, men tá talan er um beinleiðis umseting, noyðist hann at taka málið álvarsligt og umhugsa, hvørjar avleiðingar tað skal hava fyri Lassa Klein. Umframt sær sjálvum metir Hans Mortensen, at hetta eisini er skeivur atburður mótvegis øðrum.

- Hetta er eisini grovt og skeivt mótvegis kelduni, eg havi nýtt í míni samrøðu (Bernhard Ingham), tí Lasse Klein hevur eisini misnýtt hansara áskoðanir og broytt hansara orð, staðfestir Hans Mortensen.

**Lasse Klein bert ein av fleiri**

Sum sagt hevur danski blaðmaðurin ikki upplivað slíkt fyrr sjálvur, men týdningarmikið er at hugsa um, at hetta er ein áhugaverdur og afturvendandi problematikkur í fjølmiðla- og rithøvundaheiminum yvirhøvur, og at hetta bert er eitt ávíst dømi av fleiri her á landi. Tað kann tískil tykjast órættvíst at revsa ein einstakan, tá fleiri, m.a. fjølmiðlar, hava gjørt og gera tað sama, og júst av hesum hava vit við ein rættiliga prinsipiellan trupulleika at gera. Orsakað av hesum metir Hans Mortensen tað vera týdningarmikið at rætt verður borið at.

- Eg eri glaður fyri, at slíkt verður gjørt vart við, júst tí hetta er so prinsipielt, og fyri framtíðina á økinum hevur tað týdning, at rætt verður borið at frá mínari og fakfelagsins síðu. Nú fari eg at umhugsa, um endurgjald skal krevjast frá Lassa Klein, vísir Hans Mortensen á.

Hann hevur sett seg í samband við løgfrøðiliga ráðgevan í danska Blaðmannafelagnum at vita, hvørjir møguleikar eru, og hvussu stórt eitt møguligt endurgjald sambært lógini kann vera.

# Brølarin hjá Jóannesi í BT

**Danskir fjølmiðlar lótu tað ikki fara aftur við borðinum, at formaður Javnaðarfloksins Jóannes Eidesgaard datt av undir sendiharra-døgverða á Hotel Føroyum**

RÚSDREKKA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Høvuðskjakevnið í Føroyum seinastu dagarnar um atburðin hjá Jóannesi Eidesgaard verður eisini umtalað í donskum fjølmiðlum. Stóra danska blaðið, BT, skrivaði um vikuskiftið grein um formannin í Føroya Javnaðarflokki, sum týðiliga varð rúsdrekkaávirkaður undir sendiharra-døgverðanum á Hotel Føroyum við tilsamans 112 gestum úr øllum heiminum.

Føroyski blaðmaðurin Fróði Holm Knudsen er høvundurin í greinini um tilburðin á Hotel Føroyum.

**Spottandi tóni**

BT fer ikki væl við formanni Javnaðarfloksins, og serliga verður gjørt vart við, at rúsrekkaávirkaði Eidesgaard á galladøgverðanum á fýra-stjørnaða Hotel Føroyum er fyrrverandi fólkatingslimur.

Við rættiliga spottandi tóna og yvirdrivnum lýsingarorðum um Jóannes Eidesgaard fer greinin ikki væl við fyrrverandi sosialdemokratiska fólkatingsliminum.

BT vísir tó eisini á, at Jóannes Eidesgaard hevur borið fram treytaleysa og almenna umbering í sjónvarpinum, og at atburðurin ikki fær avleiðingar fyri formanssessin hjá Jóannesi Eidesgaard í føroyska Javnaðarflokkinum.



*Danska blaðið BT borðreiddi um vikuskiftið teimum við speiskari grein um fyrrverandi fólkatingslimin Jóannes Eidesgaard og atburð hansara á Hotel Føroyum*